


www.oljan.fo

**Jan Müller** 15 - 02 - 2013

# Góð útlit fyri føroyingum á norskum skipasmiðjum

Í mong ár hevur eitt stórt tal av føroyskum handverkarum, serstakliga elektrikarar og sveisarar arbeitt á norskum skipasmiðjum í sambandi við mennandi oljuvinnuna. Nú ein rúgva av pallum skulu til klassingar er greitt, at skipasmiðjurnar fáa úr at gera. Og hetta eru sjálvandi góð tíðindi fyri mongu føroyingarnar, sum longu eru til arbeiðis í Norra. Tað eru serliga tey bæði føroysku feløgini, Pam Offshore og Faroe Offshore, sum gera sáttmálar við norskar skipasmiðjur um at leiga teimum føroyskar handverkarar. Bæði í ár og komandi ár fer at verða úr at gera á norskum skipasmiðjum, har tað í dag arbeiða nógvir føroyskir handverkarar. Tilsamans er talan um 27 ymsar verkætlanir á pallum í Norra og Bretlandi, skrivar offshore.no. Aftrat hesum verða eisini minni uppgávur, sum fara at gera, at skipasmiðjurnar hava nokk um hendi í fleiri ár. Aftrat hesum koma uppgávur í sambandi við nýggjar pallar. Tvey dømi um hesar mongu arbeiðsuppgávur eru pallurin Island Innovater, sum er á skipasmiðjuni Bergen Group Hanøytangen og skal gerast klárur til arbeiðsuppgávur á norska landgrunninum. Í Ølen liggja pallarnir West Hercules og Leiv Eiriksson. Báðir hava arbeitt úti í heimi og skulu nú gerast klárir til uppgávur í Norra. Westcon Yard skipasmiðjusamtakið, sum hevur nógvar føroyskar handverkarar í arbeiði, hevur tryggjað sær fleiri av sáttmálunum eitt nú við pallarnar West Alpha, Transocean Searcher og West Phoenix. Eitt stórarbeiði, sum er klassing av risapallinum Scarabeo 5, er enn ikki latið nakrari skipasmiðju. Fleiri norskir pallar verða eisini klassaðir á bretskum skipasmiðjum.